# Maradona fekk sessin

Helst besti spælari í fótbóltssøguni, Diego Armando Maradona, varð í gjár útnevndur sum argentinskur landsliðsvenjari. Tað hevur leingi ligið í luftini, men nú er tað endaliga staðfest og almannakunngjørt. Diego Maradona skal vera landsliðsvenjari hjá heimlandi sínum, Argentina. 48 ára gamli Maradona tekur við starvinum eftir Alfio Basile, sum segði seg úr starvinum eftir 0-1-tap fyri Kili í oktober. Tekniskur stjóri verður Carlos Bilardo, sum var venjari, tá Argentina við Maradona á odda, vann HM-kappingina í Mexico í 1986.



# Milosevic fær farvæl-dyst

Savo Milosevic er metmaðurin hjá Serbia við 101 landsdystum. Tá serbia tann 19. november spælir móti Bulgaria, fær Milosevic møguleika at takka áskoðarunum við sínum dysti nummar 102. Hóast hann í tíðini í Aston Villa varð róptur Miss-a-lot-sevic, so hevur áleyparain støðugt verið ein vandamikil harri fyri landsliðið, har hann hevur skorað 35 mál, sum er met. Av teimum 35 eru tey fimm skotin móti Føroyum, og tað hevur eingin annar spælari megnað.



*Talan er um sera spennandi venjingarferð hjá teimum 22 í hópinum hjá Ljósinum*

# Ljósið til Estlands

**Kvinnur og kvinnuunglingar hjá Ljósinum fóru í gjár á venjingarlegu í Estlandi, har tey skulu venja saman við øðrum liðum, ið fáast við estetiskan fimleik**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Ferðalagið, ið telur 22 fólk, fór úr Føroyum í gjár, og kemur aftur mánadagin 10. november. Nakrir dagar fara til ferðing, men í fýra dagar er ætlanin av hava venjingar seks tímar hvønn dag í hølunum hjá Piruett, ið fleiri ferðir hevur verið til HM í estetiskum. Venjingin snýr seg um alt frá balett, akrobatikki, fysiskari venjing til læru av koreografi og venjing saman við øðrum liðum og íðkarum, ein kann læra av. Hetta er alt saman sera spennandi, tí tað er ikki á hvørjum degi, at íðkarar fáa høvi til bara at hugsa um venjing, hvíld og at njóta optimalar umstøður, sum sum at fáa mat serveraðan, venja á røttum gólvi, balettvenjing við stong og speglum og kønum venjarum, ið eru partur av eini sterkari siðvenju við balett og akrobatikki. Hetta eru alt týðandi element í estetiskum fimleiki, og felagið væntar, at ein hjáveiði verður, at íðkararnir, sum flestallir eisini eru venjarar á almennu fimleikaliðunum fáa íblástur at lata øðrum í felagnum.

Fremsta endamálið við slíkum túri er at menna og ogna sær førleikar, so fimleikur verður tað valdandi á túrinum, men pláss verður eisini fyri onkrum søgu- og mentanarligum innslagi, soleiðis at vitan og upplivíng í sambandi við Estland verða serstøk og eitt varandi minni.

**Støðan í bólkaspælinum**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur A** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Chelsea | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 3 | 3 | 7 |
| 2 | Roma | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 7 | 5 | 2 | 6 |
| 3 | Bordeaux | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 4 | 8 | -4 | 6 |
| 4 | CFR Cluj | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| **Bólkur B** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Inter | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 2 | Anorthosis F | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 5 |
| 3 | Panathinaikos | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 4 | Werder Bremen | 4 | 0 | - | 3 | - | 1 | 3 | 6 | -3 | 3 |
| **Bólkur C** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Barcelona | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 11 | 3 | 8 | 10 |
| 2 | Sporting L. | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 9 |
| 3 | Shakhtar D. | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 4 | Basel | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 2 | 10 | -8 | 1 |
| **Bólkur D** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Atletico M. | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 2 | Liverpool | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 3 | Marseille | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 5 | 6 | -1 | 3 |
| 4 | PSV Eindhoven | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 3 |
| **Bólkur E** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Manchester Utd | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 6 | 0 | 6 | 7 |
| 2 | Villarreal | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 7 |
| 3 | Celtic | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 0 | 4 | -4 | 1 |
| 4 | AaB | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 3 | 9 | -6 | 1 |
| **Bólkur F** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Bayern M. | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 5 | 1 | 4 | 7 |
| 2 | Lyon | 3 | 1 | - | 2 | - | 0 | 8 | 6 | 2 | 5 |
| 3 | Fiorentina | 3 | 0 | - | 2 | - | 1 | 2 | 5 | -3 | 2 |
| 4 | Steaua B. | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 3 | 6 | -3 | 1 |
| **Bólkur G** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Arsenal | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 10 | 3 | 7 | 7 |
| 2 | Dynamo K. | 3 | 1 | - | 2 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 5 |
| 3 | Porto | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 3 | 6 | -3 | 3 |
| 4 | Fenerbache | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 3 | 8 | -5 | 1 |
| **Bólkur H** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Juventus | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 5 | 3 | 2 | 7 |
| 2 | Real Madrid | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 3 | BATE Borisov | 3 | 0 | - | 2 | - | 1 | 3 | 5 | -2 | 2 |
| 4 | Zenit Petersb. | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 2 | 4 | -2 | 1 |

# Høgni Madsen til NSÍ



**NSÍ skrivaði í gjár undir sáttmála við hart tacklandi fuglfirðingin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at teir fyri viku síðani vissaðu sær Jann Inga Petersen úr B68, hevur NSÍ fingið sær enn meira styrk til miðvøllin hjá Formula-liðnum hjá felagnum.

Í gjár varð nevnliga greitt, at Høgni Madsen fer at spæla fótbólt við Løkin komandi kappingarár. Høgni var í ár ein av avgjørdu lyklaspælarunum hjá ÍF, og hann var eisini partur av landsliðshópinum til nakrar dystir.

# Dia er nú Master Coach

Venjarin hjá føroyska manslandsliðnumíhondbólti, Dia Midjord, kann nú sum fyrsti føroyingurin nevna seg Master Coach í hondbólti.

Hetta er partur av donsku hondbóltsvenja raútbúgvingini, og seinastu tvey árini hevur Dia verið partur av liðnum, sum skuldi upp til próvtøku nú í heyst.

Próvtøkan var á skránni mánadagin, og her vendi tummilin uppeftir, soleiðis at Dia nú hevur neyðugu pappírini til eisini at venja europisk topplið, skuldi ein slíkur møguleiki staði í boði.

**-mørk**